





Konsertsalurin í Tivoli verður karmur um størsta tónleikatiltakið nakrantíð, har ein føroyingur er høvuðspersónur, tá Eivør Pálsdóttir trínir á pallin tann 9. september
Myndir: Bárður Eklund

# nasalur!«

róligt summar. "Eg havi onkuntíð havt nógv meiri at gjørt. Í ár havi eg valt at velja eitt sindur burturúr, soleiðis at eg havi tíð til at venja og skriva tónleik. Men allíkavæl skal eg spæla á nøkrum festivalum. Eitt nú fari eg skjótt til Hollands at framføra við DR Big Band, og eisini skal eg spæla á nøkrum tiltøkum her niðri".

Men tað er týdningarmikið fyri hana, at hon kann taka tað eitt sindur róligt. "Onkur summar hava verið øðiliga rokalig, við nógvari ferðing og tí tilhoyrandi stressinum. Men soleiðis vil eg ikki hava tað í ár. Um eg ikki havi frið og góðar stundir, fái eg ikki samla mínar tankar um at skriva góðan tónleik. Tí havi eg gjørt tað soleiðis, at har verður rásarúm fyri tí", sigur hon.

Hóast Eivør ikki vil hava ov nógvar framførslur í summar, skulu sjálvandi ikki gloyma, at Eivør fer á pall á heimavølli seinni í summar. Eivør skal framføra á G! festivalinum, og er hetta eftirhondini ein sjáldsamur møguleiki hjá føroyingum at upplivað Eivør Pállsdóttir.

### Nýggj fløga á veg

Um dagarnar tekst Eivør við at skriva tónleik. Hon hevur ætlanir um at gera eina nýggja fløgu, og fleiri av løgunum eru longu skrivað. "Tað gongur væl við tí. Eg havi fingið ein kendan íra at framleiða (produsera) tónleikin, og tað eri eg glað fyri". Talan er um viðurkenda Donald Lunny, sum m. a. annað hevur framleitt tónleik saman við U2 og Sinead O´Connor. "Hann er sera dugnaligur, og eg gleði meg til at samstarvast við honum".

"Tónleikurin sum eg í løtuni skrivi byggir uppá okkara føroyska siðaarv. Donnald Lunny er merktur av sínum tjóðskapi, so tað verður ein spennandi samanrenning millum føroyskt og írskt", sigur Eivør.

Tað er Kvinna sum skipar fyri konsertini við Eivør í Tivolisalinum, og Eivør sigur, at samstarvið teirra millum hevur verið gott fyri hana. "Tey hava hjálpt mær væl við míni heimasíðu. Tað var eisini Kvinna, sum skipaði fyri "Trýggjar Havfrýr" konsertunum, so hetta samstarv er als ikki nýtt", sigur Eivør. "Hetta er eitt samstarv, sum báðir partar eru glaðir fyri", sigur Eivør at enda.

# Maggie Reilly og F. R. David til Klaksvíkar





*Tey, ið vóruung fyrst í 80'unum kenna væl løgini »Moonlight Shadow« og »Words«. Tey verða at hoyra á SummarFestivalinum í ár, t*

**Tvey av størstu hittunum í europeiskum popptónleiki í 1980'unum verða at hoyra á Summar Festivalinum í ár. Maggie Reilly og F. R. David koma til Klaksvíkar at syngja sínar kendastu sangir, og teirra millum verða sjálvandi Moonlight Shadow og Words**

FESTIVALURIN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Summar Festivalurin kunnger í dag tveir nýggjar sangarar, ið fara at syngja á festivalinum í august.

Tað eru skotska Maggie Reilly og franski F.R. David.

Tey gjørdust víðagitin fyri at syngja nakrar av kendastu poppsangunum, sum vóru skrivaðir í 1980'unum. Maggie Reilly legði sína fantastisku rødd til meistaraverkið Moonlight Shadow hjá Mike Oldfield, og F.R. David fekk øll hjørtu at odna við sínum framúrskarandi Words.

Sangirnir eru tráspældir í føroyskum útvarpi, og hvørt mansbarn man kenna hesi heimshittini, sum kunnu upplivast live á Summar Festivalinum í ár.

Maggie Reilly og FR David fara at hava eina serstaka framførslu fríggjakvøldið á Summar Festivalinum. Tey fara bæði at syngja til somu konsertina á stóra palli, og tað fara tey at gera við einum væl mannaðum og væl spælandi bólki í rygginum.

Hesa løtuna verða tey stóru 80'ara hittini rættiliga á breddanum, og tá fáa øll møguleikan at syngja við til teir kendu sangirnar.

### Skotsk dreymarødd

Maggie Reilly er ættað úr Glasgow í Skotlandi, og hon kom rættiliga fram í europeiskum popptónleiki, tá ið hon fyrst í 80'unum samstarvaði við tiltikna sangskrivaran og tónleikaran Mike Oldfield. Teirra kendasti sangur er uttan iva Moonlight Shadow, men mong mugu eisini kenna tann frálíka To France.

Hon hevur eisini givið tónleik út sjálv, og av útgávuni Echoes gjørdist sangurin Everytime We Touch eitt stórt hitt.

Maggie Reilly hevur samstarvað við nógvar kendar tónleikarar – eitt nú Mike Batt og Jack Bruce – og hon hevur eisini roynt seg á egnum beinum.

Fyrst í august kann hon upplivast á Summar Festivalinum, har hon fer at syngja allar sínar kendastu sangir.

### Mjúk orð siga alt

Franski sangarin F.R. David fekk sítt stóra gjøgnumbrot í 1982, tá ið sangurin Words gjørdist eitt risahitt kring alt Europa. Words don't come easy, sang F.R. David við sólbrillum fyri eyguni og Fender-gittara hangandi um hálsin.

Words seldi ikki færri enn 8 milliónir eintøk kring heimin, og talan var um eitt tað størsta hittið í Europa síðst í 1982 og fyrst í 1983.

F.R. David gjørdi í 1999 eina nýggja innspæling av Words, og sangurin fekk aftur luft undir veingirnar heima í Fraklandi. Words er uttan iva kendasti sangurin hjá F. R. David, men hann hevur eisini aðrar sangir at bjóða, og hetta ber til at hoyra á Summar Festivalinum í ár.